

// EGIN FRAMLEIÐSLA

# Aftur til framtíðina !

Tað kundi líkst einari sjálvrannsakan, men í roynd og veru er talan um tilvild.

Mánadagin 20. apríl lótu vit upp við R.C. Effersøesgøtu í júst somu húsum, har vit byrjaðu virksemið við Petur & Petur fyri 10 árum síðani.

Nú kaga vit í nalvan, blunda og murra eitt loyniligt mantra, ið skal kveikja teir somu góðu andar, ið júst á hesum stað góvu okkum so gott stimbur.

Sum so er ikki ætlanin at hava nakað hátíðarhald í hesum sambandi, men vit kunnu avdúka, at fólk eru vælkomin inn á gólvið við uppgávum og handilsligum uppskotum, ið vanta snildar visuellar loysnir – yvirhøvur.

!KON

R.C. EFFERSØESGØTA 22 // TEL 320 870 // WWW.IKON.FO